Sunnukvøldið kl. 21.55

Svikararnir



Brøðurnir Bertilsson leggja til rættis eitt rán, sum skal geva teimum hópin av peningi. Teir vita einki um ætlanirnar hjá Violet sjúkrasystrini og prestaeinkjuni, sum eisini hava brúk fyri stolnum pengum. Upptøkurnar eru gjørdar í Spania, Monto Calo, Kalmar og Stockholm.

sjónvarp

Leygardagin 22. september

19.30 **Tom Sawyer og Huckleberry Finn 8** (13)
20.15 **Stjørnur hittast**
21.15 **Hugsjónarrák í USA 2**
22.15 **Lokkifuglurin** — am. filmur
22.45
Liðugt

Sunnudagin 23. september

15.00 **Klassiskur tónleikur**
15.40 **Brøðurnir**
19.30 **Losurin Kunag** — russ. filmur
20.40 **Laurence Olivier**
21.55 **Svikarar 2** (3)
23.05 **Andakt**
23.10 **Liðugt**

Leygarkvøldið kl. 21.15

Hugsjónarrák í USA

Eftir skránni hjá Sjónvarpi Føroya, er henda sending um amerikanska samfelagið, sum í nútíðini er fyri stórum broytingum. USA, sum er eitt av heimsins størstu iðnaðarlondum, skiftir nú ham. Frá at vera framleiðsluland, verður broytingin tann, at samfelagið framleiðir eina ávísa vitan ístaðin. Í framtíðini verður roknað við, at vitan fær størri samfelagsvirði enn vørurframleiðsla.

Ein treyt fyri at so umfevnandi broyting kann gerast í USA, er, at ein ávís spjaðing noyðist at fara fram í teimum stovnum og fyritøkum, sum í dag hava avgerðarrætt — ið er ein treyt fyri at samfelagshjólini skulu mala viðari.

Komandi árini fara samtyktirnar at verða tiknar í lokalsamfeløgum og ymsu statunum í USA. Hetta fær samstundis fylgjur, at størri fyritøkur og stovnar ikki fáa so stóran týdning í samfelagnum. Slíkar hugsanir gera fleiri fólk sær í USA um framtíðina. Ein teirra er John Naisbitt, sum eisini sigur frá í sendingini. Hann er rithøvundi og hevur skrivað bókina um sama evnið »Megatrends«, ið er seld í 4 mill. eintøkum, umframt at hon er umsett til 16 mál. Hon er eisini at fáa á donskum máli.

Werner Svendsen, danskur sjónvarpsmaður, hevur lagt sendingarnar til rættis.

Sunnukvøldið kl. 20.40


Laurence Olivier

Í tveimum sendingum sigur Laurence Olivier, kendi sjónleikarin, frá um arbeiði sítt innan sjónleik og film og teir leiklutir, sum hann hevði í árunum frá 1935 og fram til í dag. Hetta er fyrstu ferð, at Laurence Olivier sigur lívssøgu sína, og fekk hon virðisløn sum besta dokumentarsending í 1982.

Laurence Olivier byrjar í fyrstu sending at greiða frá barnadøgunum í »skugganum av kirkjuni«, sum hann málber seg. Pápi hansara var trúboðari, og ferðaðist víða í sínum yrki. Tað førdi við sær, at familjan — trý børn og foreldur, búðu stutt tíðarskeið á sama stað.

Bert 10 ára gamal framførdi Laurence Olivier á fyrsta sinni í skúlasjónleiki, har hann leikti Brutus í »Julius Cæsar«, eftir Shakespeare. Í 1924 fór hann á sjónleikaraskúla og byrjaði sum yrkisleikari í Birmingham í 1926.

Laurence Olivier hevur spælt inn óteljandi filmar, men er best umtóktur sum sjónleikari, ið sera væl megnar at tulka Shakespeare leiklutir. Hann var langt tíðarskeið knýttur at Shakespeare-leikbólkinum á Old Vic leikhúsinum í London, og gjørdist hann seinni leikhússtjóri har í 1944. Hann var giftur við Vivian Leigh, sum eisini var kendur sjónleikari í síni tíð.



Leygarkvøldið kl. 22.15

Lokkifuglurin

Amerikanski sjónvarpsfilmurin er um Mary(Karen Valentine), sum er fráskild mamma. Hon fer í arbeiði hjá løgregluni í New York fyri at fáa hjálp til heilivág til sjúka son sin.

Mary kemur í stranga venjing, og hon megnar til fulnar hesa uppgávu. Hon fær arbeiði innan løgregluna sum lokkifuglur, sum er serdeild innan hetta yrki. Mary fær kortini so nógv um at vera í arbeiði sínum, at hon kennir samvitskubit av, at ábyrgdarkenslan fyri soninum verður skúgvað til viks.

